LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

**Løgtingið**

**Svar**

**uppá**

**skrivligan fyrispurning nr. 080/2020 eftir tingskipanini § 52a til Bárð á Steig Nielsen, løgmann, frá Jóhannis Joensen, løgtingsmanni, um vápnapass**

**Fyrispurningurin er soljóðandi:**

1. Hvussu gongur arbeiðið við at tryggja føroyskum ítróttaskjúttum eitt vápnapass, sum ger, at teir kunnu ferðast til kappingar eins og skjúttar í restini av Europa?
2. Hvat ætlar løgmaður at gera til tess at tryggja, at málið um nýtiligt vápnapass til føroyskar skjúttar kemur uppá pláss sum skjótast?

**Svar:**

**Til nr. 1 og 2**

Tað gongur væl at gera tað lættari hjá føroyskum ítróttaskjúttum at kunna ferðast til kappingar uttanlands.

Vápnalógin varð broytt í november 2020. Fleiri broytingar eru gjørdar í samráð við millum annað Skjótisamband Føroya við tí endamáli at lætta um hjá myndugleikum og skjúttum, tá ið tey ferðast uttanlands.

Seinni er ásett í kunngerð, at umsøkjarar kunnu fáa eitt serligt útflutningsloyvi til vápn, sum hevur eina gildistíð upp til 2 ár. Útflutningsloyvi kann tá nýtast við ferðing til skotkappingar, ítróttarlegur, veiðu ella líknandi, um loyvishavarin kann skjalprógva endamálið við ferðini. Útflutningsloyvi verður treytað av, at viðkomandi, sum vil flyta út vápn, hevur eitt galdandi vápnaprógv við vápnatrygdarskeiði.

Í galdandi vápnalóg er ein heimild fyri at áseta reglur um eitt føroyskt vápnapass, sum svarar til reglurnar um ES-vápnapass, sum eru galdandi í ES-limalondunum.

Um eitt føroyskt vápnapass skal góðkennast av ES, krevur hetta tó samráðingar við ES.

Tinganes · FO-100 Tórshavn · Faroe Islands
Tel. +298 306000 · Fax +298 306015 · info@tinganes.fo · www.tinganes.fo

LØGMANSSKRIVSTOVAN

Í Tinganesi, 16. februar 2021

Bárður á Steig Nielsen
løgmaður